# Millum menn og kvinnur í Havn

Millum menn og kvinnur er heitið á listaframsýning, sum letur upp í Listaglugganum í Niels Finsensgøtu



*Zacharias Heinesen, listamaður, er annar av framsýnarunum í Listaglugganum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað eru listamenninir Torbjørn Olsen og Zacharias Heinesen, sum sýna fram málningar og vatnlitsmyndir. Við á framsýningini eru umleið 25 verk, sum øll eru málað serliga til hesa framsýningina.

Øll myndevnini eru úr Tórshavnar Kommunu – tó eru einstakar "Havnardamur" sum Torbjørn Olsen hevur málað.

Í bókini "Livandi List" skrivar Inger Smærup Sørensen m.a. soleiðis om Torbjørn Olsen:

" Málningarnir hjá Torbirni Olsen vísa okkum, at megin í einum málningi er í litinum; styrkin í litinum, tað viðkvæma í litinum og í teimum pinkalítlu skiftinum millum litir, sum málningurin betur enn nøkur onnur listagrein megnar at vísa. Megin í málninginum er eisini í tí tóma rúminum, sum er at síggja tey støð, har løriftið er órørt, har rúmið knappliga gerst undarligt, uppbýtt, ambivalent, og tað er í linjuni, sum ta einu løtuna er dynamiskt og tykist at liva sítt egna lív og í eini aðrari løtu er konstruktivt og byggir upp rationell skap og rúm."

Um Zacharias Heinesen skrivar Inger m.a.: "Tá eg havi givið honum so stóran týdning fyri føroyska myndlist, er tað tí, at hann hevur megnað at menna føroysku listina til eina sjálvstøðuga list. Hann hevur víst føroysku listini, hvønn veg hon skal stevna, og hann hevur givið henni eitt skap og eitt úttrykk, sum ikki finst nakra aðrastaðni. Tað er ársakað av honum, at til ber at tosað um ein føroyskan málning."

Framsýningin er væl samansett, samstundis sum hon væl lýsir ymiskleikarnar hjá tveimum av okkara bestu listafólkum. Man kennir seg aftur í Havnini millum málningarnar og eisini kennir man aftur onkra av "Havnadamunum".

Framsýningin er við at undirstrika dygdina í føroyskari myndlist og er avgjørt verd at vitja.

Framsýningin í Listaglugganum letur upp fríggjadagin kl. 16.00 og verður at síggja allan juni mánað.

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

# Vitjan hjá Barbaru »heima í Havn«



»Heima í Havn« kallaðist býlingurin í norðrasta parti av Gongini í gomlu Havnini. Her var elsta búseting í Havnini. Staðið er veðurgott og liggur í lívd móti vesturættunum undir Reyninum. Í Havn er vesturættin trá, men teir gomlu hava vitað, hvar teir skuldu byggja sær húsini.

Hin býarparturin í Havn tá – kallaðist »úti í Havn«. Tað var har úti, sum kirkjan stóð, áðrenn nýggja kirkjan – Havnar kirkja – varð bygd uttan fyri býin í 1788.

Á skránni Mentanarnáttina er ein túrur í hesum lítla partinum av gomlu Havnini, og verður tað Eirikur Lindenskov, sum fer at greiða eitt sindur frá um húsini, um umhvørvið, um fólk, ið hava búð har – og eisini gloppar hann dyrnar, so fólk kunnu síggja heimið hjá Beintu – ella Barbaru, sum Jørgen-Frantz Jacobsen kallaði hana í skaldsøguni. Tann veruliga Beinta – doypt Bente Christine Broberg, varð fødd í Nýggjustovu í 1667, og har vaks hon upp, áðrenn hon frá 1695 - 1706 giftist trimum prestum.

Hálva aðru øld seinni vaks faðirin hjá skriftmáli føroyinga, V. U. Hammershaimb, upp í somu húsum, sum seinastu fleiri hundrað árini hava hýst hundraðtals fólkum.

»Sjáldsaman anga av kamfertræ, rosinum og finskari tjøru…«. Soleiðis yrkir Hans Andreas Djurhuus um Gongina. Hann vaks upp í Áarstovu, ovast í Gongini, og Havnará tutlaði beint undir kamarsvindeyganum.

Tað er so týðuligt, at áin og umhvøvrið »heima í Havn« hevur verið íblástur í nógvum av skaldskapi hansara. Hann skrivaði eisini aðru skaldsøguna, sum kom út á føroyskum í 1927, Beinta – sum eisini byggir á søgnina, sum Jørgen-Frantz Jacobsen brúkti til skaldsøguna um Barbaru, sum kom út í 1939.

Eirikur Lindenskov keypti Nýggjustovu í 1988, og hann hevur sjálvur restaurerað húsini, sum eru friðað sum fornminni. Hann er eisini í ferð við at umvæla grannahúsini Baianstovu og Kamarið – og tá verkætlanin hjá honum »heima í Havn« er liðug, hevur hann eisini umvælt báðar Dandastovurnar.

Tá verða øll hesi gomlu húsini brædd við finskari tjøru og flagtakt.

# Søgan oman eftir Varðagøtu

Ikki minni enn trý stór skøld hava búð á Varðagøtu, einasta føroyska kleystrið og nýggja og gamla katólska kirkjan eru at finna her, og við byrjan er eitt keramiskt verkstað, og við endan eitt bókbindarí

Googlar tú inn á Varðagøtu, finnur tú mangt um Varðagøtu og uppi undir Varða, men kanska ikki tað, tú leitaði eftir.

Onkunstaðni stendur, at við Varðagøtu eru tveir skúlar, barnagarður, vøggustova, viðarlund og handil. Bussleiðin koyrir í dag oman eftir Varðagøtu, Guðrið Poulsen hevur keramiska verkstaðin niðast á Varðagøtu, og ovast uppi, har Varðagøta fer í Ringvegin er djóralækni. Har er gamla katólska kirkjan, sum H.C.W. Tórgarð teknaði, og har er nýggja katólska kirkjan, sum Árni Winther teknaði. Har er kleystur, og har er stóra kervisstøðin hjá SEV.

Har búðu William Heinesen og Heðin Brú, og longri uppi undir Varða búði Christian Matras.

Men har er so mangt annað á Varðagøtu, sum ikki er at finna á www.google.com.

Um vit finna alt Mentanarnáttina, tá vit spáka oman eftir Varðagøtu, fáa vit at síggja. Har er so mangt broytt, umbygt og bygt nýtt, men enn er nógv eftir av tí gamla. Teir báðar túrarnar, Felagið Tórshavn hevur havt oman eftir Tinghúsvegnum og heim eftir Landavegnum, vóru stak væl eydnaðir, og tað verður hesin oman eftir Varðagøtu eisini.

Gongutúrurin byrjar á krossinum millum Varðagøtu og gamla Oyggjarvegin, beint við har, sum rulliportrið stóð, nakað niðanfyri bókbindaríið hjá Helga Justinussen, kl. 19.15.

Gongufelagið vónar at síggja øll tey mongu, sum hava spákað omaneftir og niðaneftir Varðagøtu – summi heim, summi til arbeiðis, í gamla svimjihylin ella í skúla. Mangar eru søgurnar, ið kunnu sigast um hús og fólk við Varðagøtu, og fleiri vit eru, fleiri verða kendu andlitini, sum vit fara at síggja.

Mentanarnáttina, kl. 19.15 síggjast vit spákandi oman eftir Varðagøtu.

GG Bussleiðin nr. 1 fer úr Steinatúni kl. 19:03.

